

Leygarkvøldið lá stórt grót mitt á koyribreytini í Hvalbiartunlinum. Tað var rapað undan loftinum, men til alla lukku var ongin bilur fyri, so ongin skaði stóðst av hesum. Hetta er enn ein áminning um, hvussu vánligum standi, tunnilin er í



Her liggur tað mesta av grótinum, sum rapaði niður, lagt upp á kantin inni í tunlinum

# Rapaði í Hvalbiartunlinum

**Í Leygarkvøldið rapaði grót undan loftinum í Hvalbiartunlinum, men lukkutíð var ongin bilur fyri**

FERÐSLUTRYGD
áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Tá ið ein bilførari um sjey tíðina í gjárkvøldið var á vegígjøgnum Hvalbiartunnilin, fekk hann ein hvøkk, tá ið hann var komin miðskeiðis ígjøgnum tunnilin.

Mitt á gongubreytina rapaði grót undan loftinum, men tíbetur koyrdi hann varliga, so hann fekk steðga áðrenn skaði stóðst av.

Talan er um 200-300 kilo av gróti, sum rapaði undan loftinum og tann størsti steinurin vigaði væl yvir 75 kilo, so tað kundi elvt til stóran skaða á bil og fólk, vildi so illa til at nakar var fyri.

Tíbetur var ikki nógv ferðsla ígjøgnum tunnilin akkurá hesa tíðina, tí Smyril var stutt síðani farin av Krambatanga og skuldi ikki koma aftur fyrrenn seinni um kvøldið.

Hetta hendir, hóast tað ikki eru 14 dagar síðani, at Landsverk stongdi Hvalbiartunnilin, tí hann skuldi gjøgnumgangast.

## Vánaligum standi

Á heimasíðu síni staðfestir Landsverk, at ferðsluóhapp í tunlum kunnu lættari elva til meira umfatandi vanlukkur, enn ferðsluóhapp á vegunum.

- Vit hava sæð fleiri ræðandi dømi úr øðrum londum. Tí er tað umráðandi at skipa fyri tiltøkum, sum kunnu fyribyrgja óhappum í tunlum og/ella í minsta lagi minka um avleiðingarnar, sigur Landsverk.

Hann sigur, at ein partur av hesum arbeiði er at byggja og innrætta tunlar rætt. Men harumframt er eisini neyðugt at kunna fólk um, skulu bera seg at, tá ið óhapp henda í einum tunli og tað hevur Landsverk gjørt faldara um. Annars hevur Landsverk eisini staðfest, at Hvalbiartunnilin er ein av fleiri tunlum, sum ikki lúka nútíðar trygdarkrøv og tað hevur Hvalbiar Bygdaráð eisini víst á. Bygdaráðið og vinnulív í Hvalba hava leingi víst á týdningin av at fáa nýggjan tunnil, tí tunnilin, er so trongur og vánaligur, at hann forðar nógva vinnulívinum í bygdini at virka og at mennast.

Fyribils sær kortini út til eftir politisku raðfestingini, at tað fara at ganga minst nøkur ár, áðrenn nýggjur Hvalbiartunnil verður veruleiki.

## Høli ynskist

Vit sóknast eftir einum høli til viðfestisvogn okkara. Vognurin er 2 m breiður og 7 m langur.

Høli skal helst vera í miðstaðarøkinum og lætt at koma til.

**Vinarliga ring á tlf. 21 41 70**

12 MAÐUR FAROESE FOOTBALL SUPPORTERS



Grón
Tlf 312161
gron@gron.fo
www.gron.fo

**Bestu piparnøturnar fáa tit hjá okkum**

## Toyota Hiace 2,4



Árg. 2000. Hevur koyrt 120.000 km. Hevur takboylar og krók til viðfestivogn.
Til sølu fyri 80.000 kr. íroknað mvg

**Tlf 215877**

## Lastbilur til sølu



Volvo FL6-14 • Uttan plátur • Kr. 9.200,- u/MVG

**Ring á tel. 220002 um tygum hava áhuga**